# Álit

# í

## løgtingsmáli nr. 11/2010: Uppskot til løgtingslóg um stjórnarskipan Føroya

Poul Michelsen, tingmaður hevur lagt málið fram tann 17. august 2010, og eftir 1. viðgerð 23. september 2010 er tað beint í §-25 nevnd mannað við 2 limum úr teim 4 størstu flokkunum og 1 limi úr teim 2 minstu flokkunum. 17. november 2010 varð nevndin víðkað við einum uttanflokkatingmanni.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 21. oktober, 1., 8., 15., 22. og 29. november, 6. og 13. desember 2010, 17., 24., og 31. januar, 7., 14., 21. og 28. februar og 7., 14., 21. og 28. mars, 11. og 26. apríl og 2. mai 2011. Tilsamans 22 fundir.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund Leiv Persson, løgfrøðing, Boga Eliasen, Halgir Winther Poulsen, Gurið Joensen og Hans Andrias Sølvará**,** serfrøðingar. Bruno Kaufmann serfrøðing í beinleiðis demokratii (fólkaatkvøðum) og Advokatfelag Føroya, umboðað av Alfred Petersen, Hans Trúgva Teirin, Bjørn á Heygum og Turið Debes Hentze.

Nevndin hevur eftir umbøn fingið skriv frá Javnstøðunevndini og Løgmansskrivstovuni um heiti og kyn í uppskotinum, frá Landsgranskoðaranum um partin av uppskotinum, sum snýr seg um grannskoðan, og frá Fíggjarmálaráðnum um partin, sum snýr seg um fíggjarlóg v.m.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í 3 meirilutar og 7 minnilutar.

**Ein meiriluti** (Hans Pauli Strøm, Sjúrður Skaale, Helgi Abrahamsen, Edva Jacobsen, Bjarni Djurholm, Jákup Mikkelsen, Nita Næss og Poul Michelsen) setir fram hesi

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

*1)* Formæli verður orðað soleiðis:
*"Formæli*
*Vit, Føroya fólk, samtykkja hesa stjórnarskipan. Hon er grundvøllur undir stýri okkara, ið skal tryggja frælsi, trygd og trivnað.*
*Vit bygdu landið í fornari tíð og skipaðu okkum við Løgtingi, lógum, rættindum og skyldum.*
*Stjórnarskipanin staðfestir, at landsins borgarar eru upphav til alt politiskt vald í landinum, og hon skipar Føroyar eftir nútíðar tørvi við fólkaræði, løgræði, rættindum og skyldum.*
*Stjórnarskipanin virðir teir stjórnarrættarligu sáttmálar og avtalur, sum eru í gildi, tá hon verður sett í verk, men staðfestir, at føroyskir myndugleikar hava fullan rætt til at siga hesar upp og taka við málsræðinum. Eingin lóg ella sáttmáli kann setast í gildi fyri Føroyar uttan Løgtingsins samtykki."*
2) § 1(4) verður orðað soleiðis:

”*Stk. 4.* Um gjørt verður av at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt ríki, skal fólkið taka endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi eitt hálvt ár eftir og í mesta lagi eitt ár eftir, at Løgtingið hevur tikið støðu sína.”

3) § 3 verður strikað.

4) Í § 9(3) verður aftaná orðið ”handtøku” sett: ”ella seta í varðhald.”

5) § 9(4) verður orðað soleiðis:

”*Stk. 4.* Áleggur dómari varðhald, kann tað í mesta lagi verða í 4 mánaðir, og bert um longri revsing er væntandi. Dómari kann kortini í heilt serligum førum áleggja longri varðhald enn fýra mánaðir.”

6) Í § 11(2) verður orðið ”tinglimum” broytt til: ”tingkvinnuum/monnum”.

7) Í § 15(2) verður ”, friði” strikað, og í § 16(1) verður: ”, frið” strikað.

8) § 18(1) verður orðað soleiðis:

”**§ 18**. Øll eiga javnbjóðis rætt til undirvísing. Øll eiga rætt til undirvísing í almennum fólkaskúla. Øll hava skyldu at taka við undirvísing í barna- og ungdómsárum.”

9) Í § 21 verður (2) stk. 4, (3) verður stk. 2 og (4) verður stk. 3**.**

10) § 23 verður strikað.

11) Í § 24 verður (2) stk. 3 og (3) stk. 2.

12) § 25 verður orðað soleiðis:

“**§ 25.** Øll fyrisiting skal vera grundað á lóg, góðan fyrisitingarsið, opinleika og gjøgnumskygdar mannagongdir.

*Stk. 2.* Allar fyrisitingarligar avgerðir skulu vera sakliga grundaðar.

*Stk. 3.* Fyrisitingarlig rættindi og mannagongdir skulu ásetast í lóg, sum m.a. skal áseta rætt til innlit í almenn viðurskifti, egin viðurskifti og avgerðarmál, rætt til at leggja fyrisitingarliga avgerð fyri óhefta kærunevnd ella dómstól, rætt til hoyring um avgerðir og fyriskipanir; rætt at lata onnur umboða seg í almennum málum, og krøv um gegni í fyrisitingini.

*Stk. 4.* Stovnar skulu halda seg innan fyri vald sítt og heimildir.

*Stk. 5.* Eingin avgerð ella kunngerð, einki boð ella krav kann fara um mark, men skulu verða skikkað at náa máli sínum og ikki fara longri enn neyðugt.”

13) Í § 29(2) verður ”dómsmenn” broytt til: ”leikir dómarar”

14) § 31(3) verður orðað soleiðis:

”*Stk. 3.* Lógaruppskot, ið Løgtingið hevur samtykt, fær gildi, tá ið tað er staðfest av løgmanni og kunngjørt innan 30 dagar eftir samtyktina.”

15) Í § 32(5) verður orðið: ”vegleiðandi” strikað.

16) § 32(6) verður orðað soleiðis:

”*Stk. 6.* Ein triðingur av løgtingskvinnum/monnum kann krevja lóg lagda til fólkatkvøðu eina viku eftir, at hon er samtykt. Um í minsta lagi helvtin av teimum, sum hava valrætt til Løgtingið, taka lut í fólkaatkvøðuni, og í minsta lagi helmingurin av teimum atkvøða ímóti, fellur lógin burtur.”

17) Í § 32 verður sum nýtt stk. 7 sett:

”*Stk. 7.* Lógir um fíggjar-, lønar- og skattamál og lógir um útinning av galdandi millumlanda sáttmálum kunnu ikki leggjast til fólkatkvøðu.”

18) Í § 33(1) verður orðið ”limir” broytt til: ”løgtingskvinnur/menn”.

19) Í § 33(5) verður orðið ”hann” broytt til: ”viðkomandi”.

20) Í § 35(1) Verður orðið ”bundnir” broytt til: ”bundin”.

21) § 35(2) verður orðað soleiðis:

”*Stk. 2.* Samsýning og eftirløn hjá løgtingskvinnum/monnum og landsstýriskvinnum/monnum verður ásett við lóg eftir tilmæli frá serligari nevnd. Broytingar í lógini fáa ikki gildi fyrrenn eftir næsta løgtingsval.”

22) § 38(2) verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Umframt løgtingkvinnur/menn kunnu bert løgmaður og landsstýriskvinnur/menn taka orðið á Løgtingi. Eftir formansins tykki kunnu onnur við serlig høvi fáa orðið á Løgtingi."
23) § 41 verður strikað.
24) Í § 43(1) verður orðið "tinglógir" broytt til: "landsins lógir".
25) § 44(1) 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Løgtingsforkvinnan/maðurin kann seta tíðarfreist á, og um ikki er rokkið á mál, verður nýtt samráð, og nýggjur samráðingarleiðari verður tilnevndur."
26) § 44(3) verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Havnar Løgtingið øllum uppskotum frá forkvinnuni/manninum um løgmansevni, verður boðað aftur til samráðs sambært stk. 1, og innan 4 yrkadagar verður sett framaftur uppskot um løgmansevni, sum Løgtingið sama dag greiðir atkvøðu um."
27) Í § 46(1) verður orðið "teir" broytt til: "tey"
28) § 46(2) verður soljóðandi:
*"Stk. 2.* Løgmaður boðar regluliga til landsstýrisfundar, har øll uppskot, sum skulu fyri Løgtingið, verða løgd fram."
*29)* § 48(2) verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Eru útlit ikki fyri, at fíggjarlógin verður samtykt, skal fyribils fíggjarlóg verða samtykt."
30) Í § 48(4) verða orðini "Allar almennar útreiðslur" broytt til: "Allar landsins útreiðslur".
31) § 48(5) verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Lán, borgan og allar aðrar almennar skuldbindingar skulu hava heimild í lóg."
32) Í § 50(1) verður orðið "Almenn" broytt til: "Landsins"
33) Í § 51(1) og (2) verður orðið "Landskassaroknskapurin" broytt til: "Landsroknskapurin"
34) Í § 55(2) verður "embætismonnum" broytt til: "embætisfólkum"
35) § 52 verður orðað soleiðis:
"**§ 52** Løgtingið velur løgtingsgrannskoðarar. Landsgrannskoðari verður settur sambært lóg.
*Stk. 2.* Landsgrannskoðarin er óheftur í øllum virki sínum og hevur rætt til allar tær upplýsingar, sum hann metir tørvur er á fyri at útinna virki sítt."
36) § 58 verður orðað soleiðis:
" **§ 58.** Broytingar í hesi lóg skulu samtykkjast á Løgtingi, men kann samtykta uppskotið ikki beinanvegin verða staðfest av løgmanni. Samtykta lógaruppskotið verður lagt til fólkið at taka endaliga støðu á fólkaatkvøðu ímillum 6 og 12 mánaðir eftir samtyktina. Reglur um fólkatkvøðuna verða ásettar í løgtingslóg. Atkvøður meira enn helmingurin av teimum, sum luttaka í fólkaatkvøðuni, fyri uppskotinum, verður uppskotið staðfest eftir vanligum reglum."
37) Sum nýggj § 59 verður sett:
"**§ 59**. Henda lóg verður sett í gildi við serstakari løgtingslóg, eftir at hon er endaliga samtykt sambært reglunum í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya, og fólkatkvøða er hildin ímillum 6 og 12 mánaðir eftir, at Løgtingið hevur samtykt uppskotið seinnu ferð, og fer samtundis úr gildi løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýriskipan Føroya.
*Stk. 2.* 27 (1) 2. og 3. pkt. og §§ 28, 29 og 30 fáa ikki gildi, fyrrenn dómsvaldið er komið undir føroyskt málsræði."

38) § 55 verður § 42, og yvirskriftin verður ”Eftirlit Løgtingsins”, § 56 verður § 43, og § 57 verður § 46, § 42 verður hereftir § 44, § 43 verður § 45, § 44 verður § 47, § 45 verður § 48, § 46 verður § 49, § 47 verður § 50, § 48 verður § 51, § 49 verður § 52, § 50 verður § 53, § 51 verður § 54, § 52 verður § 55, § 53 verður § 56, og § 54 verður hereftir § 57.
*39)* Í øllum §§ verður yvirskriftin til einstøku greinarnar sett oman fyri avvarðandi grein, og § og nummar sett til vinstru í byrjanini av hvørji §, og (tal) verður broytt til Stk. og tal í kursiv.
40) ”Landsstýrismaður” verður allastaðni og í øllum bendingum broytt til: ”Landsstýriskvinna/maður” í øllum bendingum.
41) ”Tingmaður” verður allastaðni og í øllum bendingum broytt til: ”løgtingskvinna/maður” í øllum bendingum.
42) ”Varamaður” verður allastaðni og í øllum bendingum broytt til: ”varakvinna/maður” í øllum bendingum.
43) ”Tingformaður” verður allastaðni og í øllum bendingum broytt til: ”Løgtingforkvinna/maður” í øllum bendingum.
44) ”Næstformaður” verður allastaðni og í øllum bendingum broytt til: “næstforkvinna/maður” í øllum bendingum.
45) ”tingið” verður í øllum bendinum broytt til ”Løgtingið” í øllum bendingum.
*46)* §§ 4 til 22 verða hereftir §§ 3 til 21, §§ 24 til 40 verða hereftir §§ 22 til 38, og §§ 42 til 58 verða hereftir §§ 39 til 55.
*47)* Viðvíkjandi høvuðsyvirskriftunum í 5. parti: “Løgtingið” verður sett yvir § 29, “Landsstýrið” verður sett yvir § 41, og “Fíggjarviðurskifti” verður sett yvir § 47.

**Viðmerkingar til tær einstøku broytingarnar:**

**Ad 1.** Formælið er ikki ein lógargrein, men hevur stóran týdning, tí tað ásetir ta grundleggjandi fatan, sum øll stjórnarskipanin byggir á.
Við hesum formæli hevur nevndin roynt at orða tað, sum undir viðgerðini hevur verið nevnt "tann tjóðskaparliga semjan". Vónin er, at allir føroyingar, bæði sjálvstýris- og samríkissinnað, fara at taka undir við hesum, so vit fyri fyrstu ferð nakrantíð kunnu semjast um eina fatan av, hvør rættarstøðu Føroya er í dag.
Í formælinum verður gjørt greitt, at henda stjórnarskipan virðir tær avtalur og ta siðvenju, sum verandi skipan byggir á, men ásetir samstundis, at myndugleikin kann takast aftur undir føroyskt ræði. Við hesum áseta vit sjálvsavgerðarrætt Føroya fólks.
Orsøkin til, at meirilutin av nevndini skjýtur upp at broyta formælið, ið stóð í uppskotinum, sum nevndin fekk til viðgerðar, er, at nýggja orðingin greiðari ásetir tað, sum nevnt er omanfyri.
**Ad 2.** Her verður í fyrsta lagi gjørt greitt, at føroyingar hava sjálvsavgerðarrætt - t.e. rætt at gera av sína rættarstøðu, og í øðrum lagi, hvussu farast skal fram, um gjørt verður av at broyta rættarstøðuna.
**Ad 3**. Lógargreinin er óneyðug, tí sama innihald er í grein 2.
**Ad. 4, 5, 7, 9, 11, 14, 21, 22, 24, 28, 29, 30, 31, 32, 33 og 47.** Allar hesar broytingar eru lutvíst av tekniskum slagi fyri at broyta raðfylgjuna av einstøkum stykkjum í nøkrum greinum, og lutvíst av málsligum slagi fyri at gera orðingar greiðari.
**Ad 8.** Við hesum orðingum um almennan fólkaskúla vil meirilutin gera greiðari, at øll børn skulu hava atgongd til ókeypis skúlagongd.

**Ad 10.** Meirilutin vísir á, at í § 32, stk 6 um lóggávumannagongd eru longu so greiðar ásetingar um minnilutaverju við fólkaatkvøðu, at henda grein verður ikki hildin at vera neyðug.
**Ad 12.** Greinin er meira nágreinað. Fyrisitingarvaldið er tann myndugleiki, borgarin kemur mest í samband við, og tí verður hildið neyðugt at styrkja hesar ásetingar til tess at tryggja rættartrygd borgarans mótvegis myndugleikunum.
**Ad 15, 16 og 17.** Við hesum broytingaruppskoti verða treytir og mannagongdir nágreiðaðar í sambandi við rættin hjá einum minniluta av tingfólkum at krevja mál løgd til fólkaatkvøðu.
**Ad 23.** Meirilutin heldur tað vera skeivt, at tingfólk skulu hava hesar frammíhjárættir mótvegis revsilógini fram um aðrar borgarar.
**Ad 35.** Uppskotið er eftir tilmæli frá Landsgrannskoðaranum

**Ad 36 og 37.** Hesar ásetingarnar verða broyttar, tí ivi hevur verið um, hvørt stýrisskipanarlógin eigur at verða tikin av sambært sínum egnu reglum, ella um ásetingin um, at stjórnarskipanin setir hana úr gildi, er nóg mikið. Við hesum broytingaruppskotunum verður allur ivi um mannagongdina tikin burtur.
Skotið verður upp, at broytingarnar um rættarskipanina ikki fáa gildi, fyrrenn hon er yvirtikin, til tess at taka burtur allan iva um, hvat er galdandi rættur, og til tess at tryggja, at stjórnarskipanin kann fáa fult lógargildi sama dag, sum hon verður sett í verk.
**Ad 38.** §§ 55, 56 og 57 eru fluttar, og eru broytingarnar avleiðing av hesum.

**Ad. 39**. Meirilutin metir, at tað er skynsamt, at lógin verður sett upp eins og allar lógir verða settar upp.
**Ad 6, 13, 18, 19, 20, 25, 26, 27, 34, 40, 41, 42, 43 og 44.** Nevndin hevur biðið m.a. Javnstøðunevndina um viðmerkingar til tey heiti, ið eru brúkt í stjórnarskipanaruppskotinum. Við støði í hesum hevur meirlutin gjørt av at skjóta upp, at hesar broytingar verða gjørdar, og hevur hetta gjørt, at einstkar greinar mugu umorðast..
**Ad 45.** Løgtingið verður bert nevnt Løgtingið í lógini.
**Ad 46.** Avleiðing av, at 3 greinar eru strikaðar.

**Ein annar meiriluti** (Hans Pauli Strøm, Sjúrður Skaale, Helgi Abrahamsen Bjarni Djurholm, Jákup Mikkelsen, Andrias Petersen, Jenis av Rana og Edva Jacobsen) setir fram hetta

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

1. § 21(2) verður strikað. § 21(3) verður hereftir § 21, stk. 2.

**Viðmerking:**
Meirilutin heldur hesa áseting vera óneyðuga. Øll viðurskifti í sambandi við rakstur og býti av grind fara fram eftir siðvenju og eru skipað eftir lóg

**Ein triði meiriluti** (Hans Pauli Strøm, Sjúrður Skaale, Nita Næss, Helgi Abrahamsen, Edva Jacobsen og Poul Michelsen) setir fram hesi

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

1. Í § 55(3) seinasta pkt. verður ”2/5” broytt til: ”1/3”
2. Í § 45(1) verður orðið ”sjey” broytt til ”seks”

**Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:**
**Ad 1.** 2/5 verður broytt til 1/3 til tess at halda fast um hetta lutfallið sum meginreglu í stjórnarskipanaruppskotinum.
**Ad 2.** Meirilutin vil við hesi áseting seta eina avmarking inn í lógina, so at talið av landsstýrisfólkum ikki verður økt tilvildarliga sum ein liður í poliskum maktbýti millum samgonguflokkar, tá teir skipa landsstýri.

**Ein minniluti** (Bjarni Djurholm, Jákup Mikkelsen og Edva Jacobsen) setir fram hetta

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

1. § 24(2) og (3) verða strikað.

**Viðmerking:**
Viðv. stk. 2 heldur minnilutin ikki, at vinnupolitiskar orðingar hoyra heima í eini stjórnarskipanarlóg. Talan er um regulering av virðum, sum hava beinleiðis ávirkan á vinnuliga gerandisdagin hjá vinnurekandi, og sum eiga at verða regulerað sambært viðkomandi løgtingslóg og kunngerðum. Vinnumøguleikarnir kunnu skifta frá degi til dags. Tað, sum er skilagott og rakstrarverdugt í dag, kann vera minni gott í morgin - og øvugt. Tí eiga vit ikki at leggja formalistiskar forðingar fyri, at vinnan altíð røkkur frægasta úrslitinum.
Viðv. stk. 3 heldur minnilutin, at orðingar um hesi viðurskifti eiga at vera í einari náttúruverndarlóg og ikki í eini stjórnarskipanarlóg.

**Ein annar minniluti** (Bjarni Djurholm og Jákup Mikkelsen) setir fram hesi

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

1. Í § 32(6) verður ”ein triðingur” broytt til: ”2/5”
2. Í § 45(1) verða orðini ”í mesta lagi sjey” strikað.
3. § 54 verður strikað.

**Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:**
**Ad 1.** Minnilutin heldur, at við at minka kravið viðv. minnilutaverju til 1/3 av tingfólkum er vandi fyri, at skipanin kann misnýtast og harvið missa sítt virði, og tí er tað betri at halda fast við vanliga kravið um 2/5 av tingfólkum.
**Ad 2.** Minnilutin heldur ikki, at tal av landsstýrisfólkum er eitt mál, sum eigur at setast í eina yvirskipaða stjórnarskipanarlóg.
**Ad 3.** Minnilutin tekur undir við, at Búskapargrunnur verður settur á stovn, men metir ikki, at tað er skilagott, at hann verður settur í Stjórnarskipanina. Soleiðis, sum ásetingarnar um Búskapargrunnin eru orðaðar, er tað eisini ógreitt, hvønn myndugleika hann skal hoyra undir. Tað verður heldur ikki mett rætt, at grunnurin skal hava valmøguleikar viðvíkjandi nýtslu av avkastinum. Hetta er spurningur, sum slettis ikki er endaliga viðgjørdur politiskt, og tí verður tað mett skeivt, at henda áseting verður ásett í Stjórnarskipanini, sum verður lóg oman fyri allar aðrar lógir.

**Ein triði minniluti** (Hans Pauli Strøm og Høgni Hoydal) setir fram hetta

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

1. ˝”Løgtingsins Umboðsmaður” verður allastaðni og í øllum bendingum broytt til: ”Løgtingsins Umboð” .

**Viðmerking:**
Minnilutin heldur, at eins og heitini „landsstýrismaður“, „tingmaður“ og „formaður“ eigur eisini heitið „umboðsmaður“ at verða tillagað nútíðar málbrúki.

**Ein fjórði minniluti** (Sjúrður Skaale) setir fram soljóðandi

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

§ 12(3) verður strikað.
**Viðmerking:**
Spurningurin um, hvørja støðu fólkakirkjan skal hava í samfelagnum, er sera stórur og prinsipiellur. Í Svøríki hava tey valt at skilja sundur kirkju og stat, og hesin spurningur verður nógv umrøddur í øllum vesturheiminum. Í Føroyum er spurningurin ikki minst viðkomandi orsakað av, at ein stórur partur av trúarlívinum fer fram aðrastaðni enn í fólkakirkjuni. Tað snýr seg sostatt ikki bara um sekularisering ella ikki - tað snýr seg eisini um, hvørt vit í stjórnarskipanini skulu áseta, at ein kirkja skal takast fram um aðrar.
Tað stendur greitt í §12, stk 2, at kristnitrúnni kunnu verða veittar serligar sømdir. Og tað er heilt natúrligt, tá vit hava í huga okkara søgu og mentan. Men í stk. 3 fara vit víðari og taka eina kirkju fram um aðrar. Millum hesu bæði er ein prinsipiellur munur. Vit eiga eisini at hava í huga, at fyri tað, um tað ikki stendur í stjórnarskipanini, at so skal vera, so er eingin forðing fyri, at fólkakirkjan eisini í framtíðini fer at eiga lut eftir gomlum siði. Stendur tað ikki, *kann* tað vera so. Stendur tað, *skal* tað vera so. Tí eigur alt Løgtingið at sleppa at taka støðu til spurningin um, hvørt stjórnarskipanin skal áseta, at fólkakirkjan skal eiga "lut eftir gomlum siði" ella ikki.

**Ein fimti minniluti** (Kári á Rógvi) heldur, at verkið at orða stjórnarskipan Føroya var í hæddini, tá ið Fyrra Flaggdagsálitið varð handað. Síðani er gingið støðugt niðureftir og afturá. Uppskotið á tingborði nú er merkt av søguloysi eins nógv og støðuloysi. Best er tí at taka afturíaftur Fyrra Flagdagsálitið eftir løgtingsval, tá ið vónandi og væntandi fleiri mentaði og hugaði fólk eru vald á ting. Sjálvandi er ikki ringt at betra yngru stýrisskipanarlógina, sum var løgin, undirbrotlig og serstakliga søguleys umseting úr grannamálum. Men Føroya fólk má vita, at hetta kann gerast so nógv betur; velur meirilutin at leggja hetta uppskotið fyri fólkaatkvøðu, skulu fólk vita, at tey ekkaleys kunnu vraka uppskotið og fara undir aðra, breiðari og fólksligari tilgongd at orða stjórnarskipan Føroya.
Minnilutin setir fram soljóðandi

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

1 - Formæli, skal ljóða:

*“Vit Føroya fólk samtykkja hesa stjórnarskipan.*
*Hon er grundvøllur undir stýri okkara, sum skal tryggja frælsi, trygd og trivnað.*
*Henda stjórnarskipan staðfestir, at landsins borgarar eru upphav til alt politiskt vald í landinum, og hon skipar Føroyar eftir nútíðar tørvi við fólkaræði, løgræði, rættindum og skyldum.*
*Stjórnarskipanin virðir samveldisstøðu og sáttmálar okkara, men staðfestir, at Føroya fólk hevur fulla heimild og ómissandi rætt at velja aðra støðu ella skipa stjórn sína eftir vilja sínum.*
*Eingin lóg kann verða sett í gildi fyri Føroyar uttan Løgtingsins samtykki.*
*Nú er næst, at hesir lutir eru landinum hentastir og hereftir ásettir:*“

<u>2 - § 1 skal ljóða:</u>
**“§ 1. Fólkið og landið**
(1) Føroyar eru sjálvstøðugt land og ríki, føroyingar eru tjóð, og alt vald í landinum kemur hjá (frá?) Føroya fólki.
(2) Føroyar hava sambært sáttmálum samstarvað við onnur lond og kunnu framvegis samstarva við onnur lond sambært sáttmála.
(3) Fáa samveldisstovnar vald, ið annars liggur hjá landsins myndugleikum, skal hetta verða væl lýst í millumtjóða sáttmála. Løgtingið skal samtykkja slíkan sáttmála, áðrenn fólkið tekur endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi hálvt ár og í mesta lagi eitt ár eftir.
(4) Eitt og hvørt samveldissamstarv kann á sama hátt sigast úr gildi, har fólkið skal taka endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi hálvt ár eftir og í mesta lagi eitt ár eftir, at Løgtingið hevur tikið støðu sína; vanligur meiriluti skal ráða.”

<u>3 - § 2 skal ljóða:</u>
**“§ 2. Valdsbýti**
(1) Føroyar eru land við fólkaræði, valdsbýti og løgræði. Fólkið fremur vald sítt um Løgtingið, Landsstýrið og Løgrættuna. Løgtingið er beinleiðis fólkavalt, Landsstýrið kann vera óbeinleiðis fólkavalt, og Løgrættan skal verja rættindi fólksins.
(2) Løgtingið ger landsins lóg, Landsstýrið umsitur lóg og Løgrættan dømir eftir lóg.
(3) Nevndu fremstu stovnar landsins eins og aðrir stovnar landsins og samveldisstovnar skulu halda seg innan valds og heimilda sína.”

<u>4 - § 3 skal ljóða:</u>
“**§ 3. Rættvísi og rættindi**
(1) Stjórnarskipanin er grundað á rættvísi og rættindi. Umframt rættindi, ásett í hesi skipan, verjir hon onnur sjálvsøgd og ómissandi rættindi.
(2) Valrættur og um neyðugt onnur rættindi kunnu treytast av heimarætti.
(3) Er ivi um lóg og mannagongd, skal hægri víkja fyri lægri, og fólkaræði og rættindi ganga framum.
(4) Eingin áseting, einki boð og eingi átøk mugu fara um mark til tess egnaði at náa máli sínum.”

<u>5 - § 4 skal ljóða:</u>
“**§4. Líkaregla**
(1) Øll eru líka fyri lógini.
(2) Nú skal meting gerast, tá skal líka vera líka, og ólíka vera ólíka viðfarið; almennur stovnur má greina, hvørt gjørdur munur er viðkomandi og rættvísur.”

6 - § 5 skal ljóða:
“**§ 5. Rættindi og verja teirra**
(1) Rættindi kunnu einans avmarkast við lóg og í samsvari við hesa stjórnarskipan.
(2) Rættindi kunnu um neyðugt í serligum førum knýtast at heimarætti ella bústaði.
(3) Landsins myndugleikar skulu altíð verja rættindi hjá íbúgvum landsins.”

7 - § 7 skal ljóða:
**“§ 7. Javnstøða**
(1) Øll fólk eru javnsett uttan mun til kyn, eyðkenni ella frábreðgi.
(2) Eingin munur má vera tilvildarligur, órættvísur ella mannminkandi.
(3) Var órættvísur munur gjørdur áður, kann samtykkjast at bøta støðuna, tó ikki ótíðaravmarkað.”

8 - § 23 skal ljóða:
“**§ 23. Sethús**
(1) Pant ella úttøka kann ikki fremjast í sethús. Tvingsilssøla av sethúsum og øðrum íbúðum kann bert fremjast fyri sethúsaskuld ella annað viljapant, tengt at tørvi húsfólksins.”

9 - § 27 skal ljóða
**“§ 27. Dómsvald**
(1) Dómsvald er hjá Løgrættuni og øðrum óheftum dómstólum, skipaðir í rættarstig. Rættargangur er almennur, men kann, um neyðugt, í fáum førum vera lokaður.
(2) Rættarar í Løgrættuni verða valdir á tingi eftir tilmæli frá løgmanni, grundað á meting frá førleikanevnd, teir kunnu veljast eina ferð at sita í 15 ár.
(3) Dómstólar royna øll mál um revsing, trætur millum manna og fyrisitingarmál. Løgtingið kann tó lata skipa serligar rættir fyri ávísar trætutættir. Týðandi tulking og rættindaspurningar skulu tó altíð kunna leggjast fyri Løgrættuna.
(4) Dómstólar skulu døma eftir lógini, rætta lógina og gera lóg á, har eingin lóg er.
(5) Dómstólar skulu royna allar lógir, kunngerðir, avgerðir og aðra almenna framferð og tryggja, at henda skipan verður hildin.
(6) Nú er rættur varur við skeiva framferð; tá kann hann velja betri tulking uttan afturvirkni.
(7) Nú er rættur varur við eldri lóg, ið kann vera í ósamsvari við stjórnarskipanina; tá kann hann velja at senda tinginum hana til samtyktar av nýggjum.”

10 - § 29 skal ljóða:
**“§ 29. Leik og sakkøn í rættargongd**
(1) Nevningar skulu døma í strongum revsimálum.
(2) Í øðrum revsimálum skulu eisini leikfólk døma saman við lógkønum rættara.
(3) Sakkønir dómarar kunnu døma saman við lógkønum í trætumálum.”

11 - § 31 skal ljóða:
“**§31. Lóggávuheimild**
(1) Á Løgtingi fær Fólkið rødd og tekur støðu sína.
(2) Løgtingið kann lóggeva til tess:
(2)(1) at uppfylla og skipa hesa stjórnarskipan,
(2)(2) at skipa og tryggja búskapin,
(2)(3) at tryggja og veita lóg og landaskil,
(2)(4) at veita og virða vælferð og trygd,

(2)(5) at virða og fremja fólksins rættindi.
(2) Løgtingið kann ikki geva lógir, sum av røttum eru dómar ella avgerðir ella skulu skipast eftir øðrum mannagongdum eftir hesi skipan ella eru í ósamsvari við rættindi fólksins.
(3) Lóg fær gildi eftir samtykt og eftir staðfesting og kunngerð Tingforsetans. Onnur tingsamtykt fær virknað, tá ið atkvøtt er.

<u>12 - § 32 skal ljóða:</u>
"§ 32. Lóggávumannagongd
(1) Lógaruppskot skulu fyri tingið tríggjar ferðir. Eftir samtykt við aðru viðgerð kunnu bert samsvarandi broytingar gerast.
(2) Tveir triðingar kunnu samtykkja, at lóg fær gildi við afturvirkni.
(3) Eftir val og eftir tingár falla øll framløgd uppskot burtur.
(4) Løgtingið kann veita landsstýri ella óheftum stovni heimild at áseta almennar reglur í kunngerð. Nú býður kunngerð tinginum ímóti; tá kann tingið samtykkja, at kunngerðin fer úr gildi.
(5) Løgtingið kann leggja spurningar til fólkaatkvøðu.
(6) Triðingur kann krevja samtykta lóg lagda til fólkaatkvøðu viku eftir samtykt, tó ikki fíggjarlóg ella lóg um útinnan av galdandi millumtjóða sáttmála.
(7) Uppskot kunnu leggjast fyri tingið frá ólavsøku til mikkjalsmessu. Síðan kunnu uppskot bert leggjast fram, um tveir av trimum viðmæla.
(8) Eftir framløgu beinir tingformaðurin uppskot í nevnd. Nevndirnar kunnu skipa almennar hoyringar og annars tær kanningar, ið neyðugar eru.

<u>13 - § 33 skal ljóða:</u>
**"§ 33. Løgtingsval**
(1) Løgtingið hevur eins nógvar limir sum kubikkrótin av fólkatalinum. Sama er galdandi fyri kommunustýri og onnur fólkavald ráð.
(2) Valbærur er hvør, sum valrætt hevur til Løgtings.
(3) Tingið ger sjálvt av, hvør av røttum er valdur.
(4) Tingið ger av, um limur vegna misbrots skal missa sessin."

<u>14 - § 36 skal ljóða:</u>
**"§ 36. Tingforseti**
(1) Tingið velur Tingforseta og varaforsetar.
(2) Tingforseti situr alt valskeiðið, uttan so, at tveir triðingar krevja val."

<u>15 - § 44 skal ljóða:</u>
**"§ 44. Løgmansval**
(1) Fólkið velur Løgmann.
(2) Fær einki valevni meira enn helming av atkvøðum, verður seinna kjósan tvær vikur eftir."

<u>16 - § 50 skal ljóða:</u>
"**§50. Íløgur**
(1) Allar íløgur, størri kr. 20 milliónir, størri enn ½ % av fíggjarlógini ella størri enn 5 % av árligu løgujáttan, skulu leggjast fyri fólkaatkvøðu.
(2) Allar góðkendar íløgur verða skipaðar í langtíðarætlan."

<u>17 - § 58 skal ljóða:</u>

"**§ 58. Samtykt og gildi**
(1) Stjórnarskipanin eins og seinni broytingar í henni skulu samtykkjast á tingi, áðrenn fólkið tekur endaliga avgerð á fólkaatkvøðu í minsta lagi hálvt ár seinni.
(3) Stjórnarskipanin og broytingar í henni fáa gildi tann dag, fólkið hevur tikið støðu."

**Ein sætti minniluti** (Høgni Hoydal) mælir í fyrsta lagi frá at hava 2. viðgerð og samtykkja uppskot um stjórnarskipan nú. Og í øðrum lagi at samtykkja upprunauppskotið við smærri tekniskum broytingum og eini styrking av fólkaræðisliga grundarlagnum og mannagongdunum viðvíkjandi beinleiðis fólkaræði.

Í øllum førum verður mælt til, at almennar hoyringar og fólkslig viðgerð verður skipað um uppskotið, áðrenn Løgtingið samtykkir tað endaliga.

Málið um at samtykkja føroyska grundlóg og stjórnarskipan, hevur tíverri tikið eina sera óhepna vend, har farið verður frá tí grundarlagnum, ið hevur verið berandi undir øllum tí stóra arbeiðinum, sum fakfólk og politikarar hava gjørt síðani 1999. Við tveimum drúgvum álitum og uppskotum.

Hetta grundarlagið hevur bygt á tríggjar súlur:

1. At skipa Føroyar á fólkaræðisliga grund, har Føroya fólk fyri fyrstu ferð samtykkir sítt egna stjórnarliga grundarlag og ásetir síni egnu rættindi í lóg, sum er grundleggjandi og oman fyri allar aðrar lógir.

2. At uppskot til stjórnarskipan verður gjørt í semju við denti á rættindi hjá føroysku tjóðini og egnu rættarsøgu okkara, og at allar royndir verða gjørdar at sleppa undan partapolitiskum tvídráttum um viðurskiftini mótvegis øðrum londum og uppíblanding frá myndugleikum og valdi, ið ikki eru fólkavald.

3. At stjórnarskipanin verður væl og virðiliga viðgjørd í almenninginum við hoyringum, upplýsingum og orðaskifti.

Hetta er eisini orsøkin til, at málið hevur fingið so drúgva viðgerð, hóast samgongur og meirilutar hava sitið, ið kundu havt avgreitt eina skipan gjøgnum tingið við ymsum avtalum.

Tjóðveldi hevur tikið undir við øllum teimum uppskotum, ið higartil eru løgd fram, síðani fyrsta álitið varð lagt fram – hóast nógv er tikið burturúr og broytt í royndum at fáa breiðar semjur.

Tað eydnaðist eisini í fjør at fáa semju um eitt uppskot at leggja fyri tingið, har allir flokkar uttan ein løgdu eitt felags álit fram. Uppskotið var ein munin skerd og umorðað útgáva av seinasta uppskotinum og álitinum frá stjórnarskipanarnevndini, ið varð sett saman av politikarum og fakfólki.

Stutt eftir kom eitt stórt trýst frá danska forsætisráðharranum og ymsum serfrøðingum úr Føroyum og Danmark, har uppskotið varð mett at vera "ólógligt", og ført varð fram, at Føroya fólk hevði ikki rættindi at samtykkja og áseta slíka lóg og tey rættindi, ið hon staðfestir. Grundgevingarnar og atfinningarnar vóru ikki festar í uppskotið

sjálvt, men í tilvísingar til donsku grundlógina, heimastýrislógina, yvirtøkulógir, uttanríkispolitisku lógirnar o.a. – lógir, sum Føroya fólk ongantíð hevur samtykt.

Síðani varð uppskotið – ið nærum full semja hevði verið um – lagt fram aftur, og lagt til eina nýggja §25-nevnd at viðgera.
Eftir hetta eru brádliga í seinastu pørtunum av viðgerðini skotnar grundleggjandi broytingar upp í formælinum, í grein 1, í ásetingunum um gildiskomureglur o.a. fyri rættarskipan og dómstólum og fyri stjórnarskipanina sjálva.

Hesi broytingaruppskot hava tikið burtur og broytt tær orðingar, ið flestar atfinningar hava verið ímóti frá donskum myndugleikum. Orðingin um, at føroyska stjórnarskipanin er oman fyri allar aðrar lógir er tikin burtur. Somuleiðis orðingin um, at landsins lógir eru bert tær, ið eru framdar á rættan hátt og av fólkinum sjálvum. Ístaðin er skotið upp at seta inn, at stjórnarskipanin virðir ta lóggávu, ið er sett í gildi fyri Føroyar.

Eisini eru broytingar gjørdar í fyrstu grein, sum sáa iva um tær avgerðir, ta rættarstøðu og ta fólkaatkvøðu, ið Føroya fólk frammanundan hevur bygt á.

Hartil eru broytingar gjørdar í gildiskomureglunum, sum í fyrsta lagi taka gildiskomuna um ásetingar fyri dómsvaldið og rættarskipan burturúr – og í øðrum lagi seta gildiskomureglurnar fyri stjórnarskipanina saman við lógini um stýrisskipan Føroya.

Skal føroyska stjórnarskipanin byggja á veruligt fólkaræði, so er tað sjálvsagt, at tað bert er Føroya fólk, ið kann seta hana í gildi við fólkaatkvøðu – og ikki tvey fylgjandi Løgting, soleiðis um stýrisskipanin varð sett í verk.

Samstundis kann stýrisskipanin setast úr gildi eftir sínum egnu reglum.

Avleiðingarnar av teimum uppskotnu broytingunum eru í minsta lagi, at grundarlagið undir stjórnarskipanini er munandi broytt, og at sterkur ivi kann sáast um, hvør lóggáva verður nýtt sum grundarlag fyri rættindunum hjá føroysku tjóðini frameftir. Í ringasta føri, kann hetta nýtast at fremja størri afturstig í rættarstøðu føroyinga og leggja avgerðarrætt í hendurnar á myndugleikum uttan fyri Føroyar.

Og tað tykist óskiljandi, at roynt verður at gera hesar broytingar eftir krøvum frá donksum myndugleikum, tí framvegis fara danskir myndugleikar uttan iva at krevja aðrar broytingar í øðrum greinum.

Hesum broytingum mælir Tjóðveldi staðiliga frá – og hevur sum minsta mark skotið upp, at ein so grundleggjandi broyting av uppskoti og grundarlagi, ið hevur staðið í 11 ár uttan mótmæli frá nøkrum flokki, fær eina drúgva viðgerð.

Við slíkari grundleggjandi broyting, fær stjórnarskipanin nærum somu støðu sum stýrisskipanarlógin og kann fatast á sama hátt – hóast enn eru partar av lógini, ið avgjørt eru framstig í mun til galdandi stýrisskipan.

Uppskotnu broytingarnar broyta støðuna hjá lógini soleiðis, at uppskotið átti at fingið eina nýggja fyrstu viðgerð.

Hin avleiðingin av gongdini í nevndararbeiðinum er, at farið er burtur frá grundsúluni um at gera alt fyri at fáa breiða semju um málið.

Nú liggja á borðinum ein ørgrynna av broytingaruppskotum við skiftandi minnilutum og meirilutum. At fara undir at viðgera hetta í tingsalinum, kann gerast ein ørkymlandi og tilvildarlig gongd – ikki minst í eini politiskari støðu, ið er merkt av valstríði og ótryggleika.

Tann triðja súlan undir arbeiðinum, ið er farið fram yvir 11 ár, hevur verið, at stjórnarskipanin skal hava eina greiða fólksliga viðgerð við almennum hoyringum, orðaskifti og viðgerð.

Tí verður skotið upp, at áðrenn Løgtingið tekur nakra endaliga støðu, verður hendan viðgerð skipað og løgd til rættis.

Sitandi §25-nevnd hevur havt fund við serfrøðing í tí, sum kann nevnast "beinleiðis fólkaræði". Hesin serfrøðingur vísti á, at í teimum flestu nýggjari grundlógunum, ið eru samtyktar síðani 1990'ini, eru ásetingar um beinleiðis fólkaræði við ymiskum háttum og fortreytum.

Í stuttum snýr tað seg um, at borgarar í landinum kunnu í felag krevja mál til viðgerðar og avgerðar – antin í kommununum, á tingi ella við fólkaatkvøðum. Tað merkir, at tað ikki bert eru tingfólk og stjórn, ið hava rætt til at reisa mál beinleiðis í politisku skipanini.

Í ymsum londum eru ásetingar um, at ein so og so stórur partur av veljarunum kunnu við undirskriftum krevja eitt mál viðgjørt ella lagt fyri tingið. Í øðrum førum eru ásetingar um, at ávísur partur av veljarunum kann krevja mál til fólkaatkvøðu.

Í Føroyum hava vit lítlar og ongar siðvenjur á hesum øki við beinleiðis fólkaræði – har fólkið sjálvt eigur atgerðarmøguleikar.

Men tað er avgjørt vert at viðgera og taka við í uppskot og hoyringar um føroysku stjórnarskipanina.

Tí mælir minnilutin til tvey uppískoyti til upprunauppskotið til lóg um stjórnarskipan Føroya undir einum nýggjum parti, ið fær heitið Beinleiðis fólkaræði, og setir fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1) Sum nýggj § 33 verður sett:
**Beinleiðis fólkaræði**

"**§ 33.** Tíggju prosent av veljarunum, ið hava valrætt til Løgtingið, kunnu við undirskriftum krevja, at ávíst mál verður tikið til viðgerðar og gjørt av á Løgtingi.
*Stk. 2.* Nærri ásetingar um mannagongdir og krøv til hesar atgerðir verða ásettar í lóg."

2) Sum nýggj § 34 verður sett:

**“§ 34.** Fimtan prosent av veljarunum, ið hava valrætt til Løgtingið, kunnu krevja mál lagt til fólkaatkvøðu.
Nærri ásetingar um mannagongdir og krøv til hesa atgerð verða ásettar í lóg.”
§§ 33 til 58 verða hereftir §§ 35 til 60.

**Ein sjeyndi minniluti** (Jenis av Rana) hevur hesar viðmerkingar:
Søgan um stjórnarskipanarnevndina er søgan um eina visjón, ið ongantíð gjørdist veruleiki, tó at visjónirnar vóru bjartar, og stuðulin við byrjan tóktist tryggur.

Kjølurin varð strektur 5. februar 1999, og viðgerðartíðin sett at verða knappar 16 mánaðir. 1. juni árið eftir, vissaðu teir kønu, varð verkið liðugt. Fínir harrar kappaðust um at trína fram í fjømiðlunum og greiða frá alneyðuga týdninginum fyri framtíðar Føroyar, tað tyktist sum, at liviførleikin á oyggjunum var neyvt tengdur at, hvussu skjótt vit megnaðu at fáa uppskotið framt, framtíðin varð málað bjørt.

Sjálvur varð eg ein at teimum, ið varð við frá byrjan. Skilti kanska ikki øll tey føgru og, fyri mær, óneyðuga mongu orðini, men royndi sum frægast. Aðrir frøðingar og verkamenn tóktust mær meira ivasamir, summir enntá neiligir, og eg fekk skjótt varhugan av, at ikki allir vildu uppskotinum væl.

**Byggitíðin, ið ikki helt**
25. apríl 2004, t.e knappliga fýra ár eftir dagin, ið varð ætlaður at vera deadline, varð fyribils uppskotið víst fram. Tey mest jaligu (les: góðtrúnu) fagnaðu uppskotinum, sum nakna keisaranum á sinni, uppkallaðu tað, í besta nationalromantsikum stíli, eftir flaggdgegnum.

Vónbrot merktu mong, meðan onnur høvdu ilt við at krógva skaðafrøi, tyktust ynskja uppskotið har piparið grør. Og endaligt úrslit spurdist einki burturúr.

**Nýggir verkfrøðingar og nýggjar tekningar**
Men lagt varð til brots aftur í mai 2005, men nú vórðu tekningar, ætlanir og enntá navnið broytt. Frá bjørtu ætlanunum um nýskipan, ið skuldi føra okkum út á nýggjar leiðir, vístu tekningarnar nú, at byggjast skuldi eftir gomlum leisti. ”Onnur tjóð hevur uppskot sum okkara ætlaða”, søgdu teir vísu, ” ikki er neyðugt við einum afturat, vit kunnu ókeypis brúka teirra”. Greitt varð, at hugsan teirra varð, at føroyska tjóðin var ov lítil til egnar visjónir, trúgv og nýhugsan.

**Eg mælti frá at taka við uppskotinum**
So við og við fullu teir mest garvaðu frá, valdu óivað meira gevandi verkløg, onnur minni roynd komu í teirra stað og arbeiðið gekst hareftir. Týðuligt var, at hugurin, sum við byrjan dreiv verkið, fánaði burtur, tekningarnar vórðu broyttar alt eftir, hvør bygdi - og árini gingu.

Tó alt fær ein enda, ella ger tað? Í hvussu so er, so var enn ein útgáva almannakunngjørd og handa eigarunum 8. apríl 2010. Ikki tað menn droymdu um við byrjan, og mær dámdi einki. Hevði tosa um serstaka verju til tey veikastu, tey, ið ikki einsamøll megna ferðina, men úrslitaleyst. Dirvi, visjón og hjartalag mangladu, tá á stóð. Valdi tí at mæla frá at taka við uppskotinum. Eg var ikki einsamallur um hetta tilmælið, fremstu serfrøðingar innan økið mæltu eisini staðiliga frá, tó við øðrum grundgevingum enn mínum - men til fánýtis.

**Eg mynstraði av eftir 10 ½ ára starvstíð**
Løgtingið tók við uppskotinum, men setti, eftir bestu forskriftum, arbeiðsfólk at gjøgnumganga tað enn einaferð, eitt arbeiði, ið vanliga er mett at varða hægst 30 dagar. Hetta var í september 2010. Eftir innanhýsis stríð var arbeiðssjakkið umskipað, og nýggjur formaður valdur í oktober sama ár. Sama dagin fekk eg loyvi frá feløgum mínum, sum tann, ið longst hevði verið við í arbeiðinum, at leggja amboðini úr hondum. Hetta var 21. oktober 2010, eftir 10 og eitt hálvt (10 ½) ára starvstíð.

Í dag hava vit so enn eitt álit á tingborðum, tó við innihaldi, ið er langt frá tí, ið frá byrjan av var ætlað. Best kann úrslitið og arbeiðið samanberast við stríð fiskimansins í skaldsøguni ”Gamli maðurin og havið”, eftir Ernest Hemingway. Søgan sigur frá aldrandi útróðrarmanninum, Santiago, ið fangaði heimsins største fisk, heilar 5,5 metrar langur. Tá hann at enda, eftir tríggjar daga stríð, vann upp land, vóru bert rovini eftir. Hávar og onnur ránsdjór høvdu etið alt tað virðismikla uttan av fongi hansara, bert beinagrindin var eftir.

Best er, um núverandi løgtingsmanning ásannar manglandi førleikan og dirvi til nýhugsan og velur at lata yvir í hendur komandi Løgtings at flyta Føroyar víðari á leið. Tí mælir minnilutin primert frá at samtykkja fyriliggjandi uppskot, um ikki, so at bøta uppskotið við broytingaruppskoti minnilutans og teim broytingaruppskotum, ið minnilutin er partur av og setir fram soljóðandi

**b r o y t in g a r u p p s k o t**

§ 8(1) verður orðað soleiðis: ”Øll eiga rætt til lív og trygd, eisini ófødda barnið”.

**Viðmerkingar til broytingina:**
Umráðandi er, at grundlógin er greið á hesum øki, so eingin ivi kann verða um, at veikasti føroyingurin, barnið í móðurlívi, eisini eigur grundlógartryggjaðan rætt til lív og trygd á jøvnum føti við okkum, sum vóru so heppin at verða fødd.

Á Løgtingið 2. mai 2011

Hans Pauli Strøm
formaður

Sjúrður Skaale
næstformaður

Helgi Abrahamsen

Bjarni Djurholm

Jenis av Rana

Poul Michelsen

Edva Jacobsen

Mikkjal Sørensen